## Claus og Jón Rói eru við

Mánakvøldið stóð greitt, at talan ikki verður um avboð frá hvørki Jón Róa Jacobsen ella Claus Bech Jørgensen til komandi landsliðsuppgávurnar.

Teir báðir fingu báðir skaðar at dragast við í farnu viku, og tí var ivasamt, hvørt tað skuldi eydnast teimum at verða klárir, nú landsliðið fer til Fraklands mikudagin.

Jón Rói keikti fótin, tá Frem seinasta mikudag spældi móti Vejle í donsku steypakappingini, og tað hevði við sær, at hann ikki var í hópinum, sum skuldi spæla móti sama Vejle í landskappingini um vikuskiftið.

Mánadagin tosaðu landsliðsvenjararnir við Jón Róa, og tá sá ljósari út. Spælarin skuldi týsdagin taka lut í venjingunum hjá Frem, og hann verður tí eisini við í hópinum, sum fer avstað til Fraklands.

Claus Bech Jørgensen fekk ferðilin av einum vøddaskaða, tá Coventry fyri góðari viku síðani vann 3-0 á Queens Park Rangerst. Ein dystur, har Claus annars skeyt fyrsta málið, sum yvir høvur er skotið á nýggja heimavøllinum hjá Coventry.

Hóttandi skaðin hevði við sær, at Claus ikki var á liðnum, tá Coventry spældi um vikuskiftið, men mánakvøldið var hann tó partur av eykaliðnum hjá felagnum, tá hesir skuldu royna seg.

Og her vóru boðini positiv. Claus var á vøllinum mest sum allan dystin, uttan at hann merkti nakað til skaðan, og tí er hann eisini tøkur.

**-mørk**

# Heine reyk

**Vantandi úrslit og ein lívsstílur, sum víkir nakað frá tí seriøsa, sum helst skal eyðkenna ein venjara. Tað tykist vera blandingin, sum at enda fekk nevndina í HB at geva Heine Fernandez reyða kortið**



HB-VENJARIN
*Jákup Mørk*

Sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár, so var tað ógvuliga sannlíkt, at HB fór at geva Heine Fernandez sekkin sum venjari hjá besta mansliði felagsins.

Svertan var neyvan starnað á prentaða blaðnum, tá verulig gongd kom á tíðindini um, at nýggjur venjari varð funnin. Boðini vóru, at spælararnir vóru boðsendir á fund við leiðsluna í felagnum undan venjingini mánakvøldið, og tað fekk illa havt fleiri enn tí einu niðurstøðuna við sær.

### Proletarur

Alment vil eingin í felagnum siga meira enn tað, sum er nevnt í tíðindaskrivinum. Men tað er eingin loyna, at hóast greipuna, sum felagið vann í fjør, so hevur talan á fleiri frontum verið um ónøgd við leiðsluna hjá Heine Fernandez.

Sum spælari varð Heine av flestu donsku miðlunum í fleiri ár skýrdur at vera ein proletarur innan danskan fótbólt. Fleiri ferðir kom hann við útsagnum, sum ikki sampakkaðu serliga væl við hugburðin hjá venjarum og leiðslum, og ofta varð tikið til, at hann heldur ikki førdi tann lívsstíl, sum vanliga verður kravdur av einum yrkisleikara.

Fram um aðrar, so dugdi hann tó at skjóta mál, og øll árini tóktist hesin eginleikin at vinna á kritikkinum. Og partvíst, so tykist hetta sama eisini hava gjørt seg galdandi í HB.

### Tá úrslitini ganga ímóti

Har vóru longu í fjør røddir frammi, sum vildu vera við, at lívsstílurin hjá venjaranum als ikki sampakkaði við støðuna hjá HB sum eitt av fremstu feløgunum í landinum. Ivaleyst hevur leiðslan eisini havt hetta í huga, men tá maðurin hinvegin framhaldandi leveraði vøruna - enntá við eini greipu sum úrsliti - bar illa til at siga, at venjarin ikki var nóg góður.

*Tá úrslitini ganga ímóti, er skjótt at viðhaldsfólkini gerast til mótstøðufólk. Tað tykist vera lærdómurin, sum Heine Fernandez hevur fingið við sær, nú hann ikki longur er partur av oddastríðnum hjá HB*

Men gribbarnir hava kanska bara bíða eftir rætta høvinum, og sum árið í ár hevur gingið, so er ágangurin vorðin alt hvassari. Hóast HB framhaldandi hevur havt fast sæti frammi í oddinum, so hava úrslitini í mangar mátar ikki verið eins góð. Í steypakappingini gjørdist talan um tap móti ÍF, og í landskappingini hava tað serliga verið avrikini á útivølli, sum ikki hava verið nóg góð.

Broytingar í liðuppstillingini - eisini hóast hesar hava verið avleiddar av skaðum og leikbannum - hava eisini skumpað eyka undir tosið móti venjaranum. Og tá úrslitini so eisini sviku, so var mest sum eingin bjarging hjá Heine.

At spælararnir eisini hava sæð skriftina á vegginum bar avrikið á Eiði leygardagin síni sjónligu boð um. Sjálvandi er tað ikki tilvitað, at spælararnir fara út at spæla ein vánaligan dyst, men ytru faktorarnir kunnu í nógvum førum ávirka motivatiónina hjá spælarunum.

### BOÐINI FRÁ HB

**Tíðindaskrivið, sum HB legði út á heimasíðuna um seks-tíðina mánakvøldið, var soljóðandi:**
Sagt skal verða frá, at samstarvið millum Havnar Bóltfelag og Heine Fernandez frá í dag av er hildið uppat.
Partarnir hava viðgjørt ítróttarligu úrslitini hjá felagnum í seinastuni og eru eftir hetta vorðnir samdir um at halda uppat við samstarvinum.
Sum nýggjan lim í venjarahópinum er settur fyrrverandi HB- og landsliðsleikarin og núverandi venjari hjá ÍF Føroyum í Keypmannahavn, Julian Hansen.
Sagt verður somuleiðis frá, at nevndin ikki hevur aðrar viðmerkingar enn hesa til ta av felagnum tiknu støðu.

# Nýggi maðurin

**Tað verður Julian Hansen, sum seinastu seks dystirnar skal standa á odda fyri besta liðnum hjá HB**

HB-VENJARIN
*Jákup Mørk*

Tað vóru gitingar av nógvum slag frammi, tá tað mánadagin skuldi setast navn á nýggja HB-venjaran. Millum annað varð her í blaðnum gitt, at Albert Ellefsen kom at fáa ein størri leiklut enn higartil, og at nýggjur maður síðani kom at verða knýttur at honum.

Hetta varð tó ikki heilt rætt. HB hevur ístaðin leitað sær út um landoddarnar, og hevur Julian Hansen játtað at taka við leiðsluni av liðnum seinastu seks umførini.

Julian, sum seinastu nógvu árini hevur búleikast í Danmark, var gjøgnum stóran part av 80'unum mettur sum besti høgri bakkurin í landinum. Við framfýsna spælinum úr verjuni gjørdist hann at kalla prototypan upp á ein modernaðan høgra bakk. Ein leiklutur, sum bara TB hevði gjørt nýtslu av í føroyskum fótbólti fyrr. Og við ótroyttiliga arbeiðsavrikið sínum var hann eisini ein, sum altíð gekk á odda, tá sigurin kravdi meira enn bara gott fótbóltsspæl.

Og ivaleyst eru tað júst slíkir eginleikar, sum HB leitar eftir eftir undan seinastu umførunum.

Sjálvur segði Julian við Dag og Viku mánakvøldið, at hann ongantíð var í iva, tá hesin møguleikin stóð honum í boði. Hann helt, at hetta var ein møguleiki, sum var ov góður at takka nei til, og eftir at hava ráðført seg við familjuna og fingið avgreitt praktisku viðurskiftini á arbeiðsplássinum, varð endaliga avgerðin tikin.

Umfram góðu avrikini í HB, var Julian eisini í drúgt áramál fastur fúsur á fótbóltslandsliðnum. Í altjóða høpi gjørdist talan tó bara um 6 dystir, men hetta kemst av, at Føroyar ikki fingu altjóða limaskap fyrr enn í 1988.

Mikudagin kemur venjarin so til landið, og so er vónin í HB, at hann er maðurin, sum kann lyfta liðið somikið, at talan kann gerast um fjórða meistaraheitið á rað.

### Spælararnir góðtaka boðini

Rúni Nolsøe er liðskipari á besta HB-liðnum, men sum umboð fyri spælararnar sigur hann seg ikki hava tær stóru viðmerkingarnar til málið.

- Tað er ein avgerð, sum nevndin í felagnum hevur tikið. Vit vórðu kunnaðir um hesa mánadagin, og meira er sum so ikki at siga um tað.

Fyri fýra árum síðani var ein líknandi støða, tá Ion Geolgau varð sendir til hús. Ta ferðina settu spælararnir seg ímóti hesum, og fingu á tann hátt sett venjaran aftur í starv. Kann tað roknast við, at ein líknandi støða endurtekur seg hesaferð?

- Tað haldi eg ikki. Sum eg havi skilt tað, so hevur hópurin valt at góðtaka boðini, og nú verða so allar kreftir lagdar í seinastu dystirnar, soleiðis at endastøðan kann gerast tann best møguliga, staðfestir Rúni Nolsøe.



*Seinastu tíðina hevur Julian virkað sum venjari hjá ÍF-Føroyum, men mikudagin kemur hann so til Føroya at leiða HB seinastu seks dystirnar*

*mynd: www.fotboltur.fo*